# – Eg vildi hava matstovu áðrenn eg bleiv 40

– TAÐ VÓRU ØGILIGA NÓGV, SUM FLENTU EFTIR OKKUM AT BYRJA VIÐ. TEY VÆNTAÐU IKKI, AT EIN MATSTOVA FÓR AT BERA SEG Í HASLEV, SIGUR KOKKURIN **JÓGVAN S. RASMUSSEN**, SUM EIGUR VÆLVITJAÐU MATSTOVUNA STEINGRIMS KÆLDER

**Pætur Hjalmar Evensson**
pature@sosialurin.fo

TAÐ ER FRÍGGJADAGUR, OG TEIR síðstu gestirnir frá fyrrapartinum eru júst farnir. Nú er ein lítil steðgur í, áðrenn Jógvan Steingrim Rasmussen og hini starvsfólkini fara at gera klárt til kvøldið, tá nýggir gestir koma at eta. Tað plagar at vera fult hús fríggjakvøld, so tað verður ivaleyst at gera í fjálga kjallaranum mitt í Haslev, her matstovan Steingrims Kælder húsast.

Føroyski kokkurin hevur hóast alt eina løtu at greiða frá sermerktu matstovu síni, sum lat alment upp í oktober í fjør.

– Eg havi altíð sagt, at eg vil hava mína egnu matstovu, áðrenn eg blívi 40. Tá eg so fekk møguleikan at lata matstovu upp, har eg búgvi, gav tað góða meining, sigur Jógvan Rasmussen, sum nú er 39 ára gamal.

Tað var í fjørsummar, at hann fekk í boðið at yvirtaka leigumálið í kjallaranum, sum fyri fleiri árum síðani eisini var matstova sum partur av einum hotelli. Hetta var upplagt, hugsaði Jógvan, sum síðani heitti á ein annan føroyskan kokk í Haslev, Mortan Mouritsen, um at vera við. Tað tímdi hann væl, og teir fóru so báðir í holt við at fyrireika nýggju matstovuna.

– Tað vóru øgiliga nógv, sum flentu eftir okkum at byrja við. Tey væntaðu ikki, at ein matstova fór at bera seg í Haslev. Men tað hava vit mótprógvað teimum so væl og virðiliga, flennir Jógvan Rasmussen.

### Tætt við at snara lyklinum

Hóast tað gongur rættiliga væl nú, so hevur tað ikki bara verið lætt. Tí føroysku kokkarnir byrjaðu við øllum oddsum ímóti sær, tá teir lótu upp mitt í koronutíðini í fjør, meðan matstovur ikki sluppu at hava opið sum vanligt.

– Tað hevur verið eitt sera hart tíðarskeið. Vit hava verið rættiliga tætt við at snara lyklinum nakrar ferðir, sigur Jógvan Rasmussen.

Føroyingarnir, sum at byrja við áttu helvt um helvt í matstovuni, máttu selja ein part av fyritøkuni fyri ikki at fara á heysin, nú teir høvdu oftari stongt enn opið. Teir valdu so at selja 30 prosent frá til tríggjar íleggjarar, sum skutu pengar í matstovuna aftur fyri 10 prosent. Hetta var ein stór hjálp, tí allir pengarnir blivu settir beint í matstovuna aftur.

– Vit satsaðu heilhjartað upp á at fáa tað at rigga. Tað vísti seg at vera rætta avgerðin, tí vit hava fult hús hvørt einasta fríggja- og leygardag. Miku- og hósdagarnir eru eisini fínir, so tað sær gott út, og vit generera yvirskot, sigur Jógvan, sum nú rekur matstovuna sjálvur, av tí at Mortan ikki longur er partur av matstovuni.

Men koronutíðin er ikki heilt av enn, og tað merkist.

– Vit hava havt nokkso strangar avmarkingar alla tíðina. Vit hava til dømis ongantíð havt opið aftaná klokkan 22, sjálvt um vit eiga at kunna hava opið til klokkan 02. Vit hava eisini verið álagdir at ganga við masku á inni í matstovuni, sigur hann og vísir á, at gestir nú skulu vísa koronupass fyri at sleppa inn.

### Lokalar rávørur og burðardygd

Maturin á Steingrims Kælder er danskur við fronskum íblástri. Um dagin ber til at fáa klassisk donsk smyrjibreyð, og um kvøldið leggja tey seg eftir modernaða franska stílinum við donskum rávørum sum grundarlagi.

Tá umrøður rávørur verður stórur dentur lagdur á burðardygd og lokalar veitarar.

– Vit hava eitt gott samband við fleiri her um leiðir og vilja gjarna stuðla upp undir lokalsamfelagið í Haslev. Mær dámar ikki so væl hesar stóru altjóða fyritøkurnar, sum gera akkurát, sum tað passar teimum, tí tær eru so stórar. Einasta merkisvøran, sum vit hava, er Jack Daniels, sigur Jógvan Rasmussen og vísir á, at tey eitt nú ikki selja Coca Cola og Tuborg.

– Burðardygd og djóravælferð hevur stóran týdning fyri okkum. Vit skulu kunna standa inn fyri tí, vit borðreiða við og vilja tryggja okkum, at djórini hava havt tað gott. Tí velja vit sjálvi kálvarnar út hjá bóndanum. Vit vilja ikki hava djór, sum hava staðið í einum trongum fjósi. So vilja vit heldur gjalda eitt sindur meira fyri kjøtið, sigur hann.

– Vit eru eisini farnir í gongd við at framleiða okkara egna vín í samstarvi við ein vínframleiðara her í Haslev. Men tað verður nokk ikki fyrr enn um eini trý ár, at vit hava eina fløsku klára.

Alt er kortini ikki frá nærumhvørvinum – har er til dømis eisini okkurt føroyskt á matskránni. Teir selja øl frá Føroya Bjór, og so hava teir onkuntíð fisk og skeljadjór úr Føroyum.

### Góður stuðul frá teimum lokalu

Tey lokalu í Haslev hava veruliga tikið matstovuna til sín, og tað fegnast føroyski matstovueigarin um.

– Tað er ótrúliga stuttligt, at vit fáa so góðan stuðul frá nærøkinum. Eg haldi, at fólk eru glað fyri, at vit hava latið upp, sigur Jógvan og greiðir frá, hvussu væl fólk hjálptu til, tá koronuavmarkingarnar vóru á sínum hægsta í fjør.

– Beinkirnir, parasollirnar og gasshitararnir, ja alt uttan fyri hjá okkum, tað er sovorðið, sum gestir okkara hava stuðlað okkum við við at keypa gávukort, meðan vit høvdu stongt.

Hetta kom í lag, tá eigararnir gjørdu eina lýsing á Facebook, har greitt varð frá, at teir ætlaðu at gera klárt til uttanduraservering. Men teir manglaðu pengarnar til tað. Teir løgdu tí upp til, at fólk kundu keypa gávukort, sum vuksu 20 prosent í virði, um keypararnir bíðaðu við at brúka tað til seinni.

### Vínbarr og hotell

Matstovueigarin Jógvan S. Rasmussen hevur nógvar ætlanir og stórar dreymar.

– Tað er rættiliga sannlíkt, at vit innan leingi fara at lata eina vínbarr upp her í Haslev. Vit eru eisini í dialogi við ein, sum eigur nakrar bygningar her, um at byggja eitt hotell, sigur hann.

– So verður tað vónandi eitt slag av symbiosu, har hotell, matstova og vínbarr kann arbeiða saman.

– Men einki er rist í stein enn. Vit ganga allatíð og hugsa um møguleikar. Haslev er ein býur við nógvum aktiviteti, og her eru nógv, sum byggja sær hús í løtuni. Hetta er ein býur í vøkstri, so her eru góðir møguleikar. Hetta er eitt gott stað, vit hava satsað uppá, sigur Jógvan S. Rasmussen, sum hevur stóran tokka til býin.

– Eg havi ongar ambitiónir um at blíva ríkur av hesum. Eg vil bara liva av tí. Mær dámar ótrúliga væl býin, eg føli meg heima her. Hetta er í roynd og veru tað staðið, eg havi búð longst út í eitt, síðan eg var sjey ára gamal. So mann hevur hug at geva okkurt aftur til býin. Tað er spennandi at vera við til at fáa lív í ein bý, sum mann er glaður fyri.





*Á middegi ber til at fáa smyrjibreyð, og um kvøldið tað franskt við donskum rávørum*
Myndir: Rasmus Árting




*Jógvan Steingrim Rasmussen og Steffen Steen Rasmussen*



**FAKTA**

**Jógvan Steingrim Rasmussen** eigur og rekur matstovuna Steingrims Kælder. Hann er 39 ára gamal, útbúgvin kokkur og býr í Haslev, har matstovan læt upp í fjør

> “Tað er rættiliga sannlíkt, at vit fara at lata eina vínbarr upp. Vit eru eisini í dialogi um at byggja eitt hotell”